# HEIMSKLASSI

**UMMÆLI Øll kenna sangirnar hjá Elton John, so onki nýtt er undir himmalhválvinum, tá hann trínur á pallin. Men tann 63 ára gamla legendan er framvegis ein framúr góður sangari og eitt flogvit á klaverinum. Sir Elton John sat stúttur í tveir og ein hálvan tíma við tangentarnar á Tórsvølli týskvøldið, og smílandi knassin var allar pengarnar verdur**



## Fólk vóru væl nøgd

**Vit steðgaðu nøkrum fólkum uttanfyri Tórsvøll og fregnaðust, hvussu teimum dámdu konsertina**



Eiler Jacobsen, Havn

*- Hetta var fantastiska góður tónleikur. Men at teir hava brúkt nógvar 10.000-tals krónur uppá ljósið, skilji eg ikki. Hatta hevði eg klárað líka væl við eini lummalykt.*



Steinolvur Petersen, Havn

*- Tá vit komu til konsertina, hugsaði eg fyri meg sjálvan "Harragud hvussu skal eg orka at sita her í tveir tímar". Men eg má siga, at hetta var øguliga nógv betri enn væntað.*



Jónleif Sólsker, Havn

*- Fantastiskt! Mær dámdi best síðsta sangin "Your song". Eg eri so stak væl nøgdur við konsertina.*



Helena Christiansen, Klaksvík

*- Mær dámdi konsertina ógvuliga væl. Eg hoyri til tað yngra ættarliðið, so teir síðstu sangirnir dámdi mær best. Elton John vísti seg sum tann sanni kunstnarin, hann er.*